# BILAR

SAMBAND
Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo
TLF 341800

# Mest framkomni evropeiski Ford




Ford Mondeo er tøkniliga tann mest framkomni evropeiski bilur, sum Ford nakrantíð hava gjørt




Mondeo við 4 hurðum og stórari baklúku



Innan líkist Mondeo nógv hinum nýggju Fordunum, S-MAX og Galaxy



Ford Mondeo stationcar

**Nýggi Ford Mondeo er triðja generatión, síðan Mondeo avloysti Ford Sierra í 1993. Síðan tá eru seldir ikki færri enn fýra milliónir Mondeo um allan heim. Mondeo er tann mest framkomni evropeiski Ford**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Leingi hevur verið bíða eftir nýggja Ford Mondeo, sum nú er komin til landið. Bilurin varð fyrstu ferð alment sýndur fram á Paris Motor Showet 2006 í september. Í fjør koyrdi James Bond (Daniel Craig) við einum Ford Mondeo 2007 í James Bond filminum "Casino Royale", hóast bilurin ikki var komin á marknaðin.

Ford Mondeo er tøkniliga tann mest framkomni evropeiski bilur, sum Ford nakrantíð hava gjørt. Stórur dentur er eisini lagdur á design, trygd og komfort og bilurin er sjaldsama ljóðleysur.

Hóast nýggi Mondeo ikki er so nógv størri enn forgangarin, er hann vorðin munandi rúmligari. Mondeo fæst við 4 og 5 hurðum og sum stationcar og í útgávunum Ambiente, Trend, Ghia og Titanium.

Mondeo fæst við fýra Duratorq TDCi Common Rail turbodieselmotorum við ávikavist 100, 125, 130 og 140 hk, og fýra Duratec bensinmotorum frá 1.6 til 2.5 litrar og 110 til 220 hk. Seinni í ár kemur eisini ein 2.3-litur Duratec motorur við 161 hk.

Umframt at Mondeo fæst við nógvari eykaútgerð, er standardútgerðin sera umfatandi, vit kunnu t.d. nevna Elektroniskt Stabilitets Program (ESP), forlyktir við "follow me home" funktión, koyriteldu og aircondition. Bilurin startar uttan lykil við "Ford Power" startknøttinum.

Mondeo verður gjørdur á eini framkomnari verksmiðju í Genk í Belgia saman við Ford S-MAX og Galaxy. Eftirspurningurin er stórur, og verksmiðjan framleiðir 1.200 bilar um samdøgrið.

Nýggi Mondeo kann síggjast og royndarkoyrast hjá P/f Wenzel. Prísirnir byrja við 259.800 ein 1,6 Ambiente við 110 hk.

## Ford Mondeo 1,6 Trend

| | |
|---|---|
| **Motorurin** | 1.6 litur, 4 syl. bensin, 125 hk |
| **0-100 km/t** | 12,3 sek |
| **Bensinnýtsla** | 17,5 km/l (millumbygdakoyring) |
| **Dekkstødd** | 205/55R16 |
| ***Stødd og vekt:*** | |
| **Longd** | 477,8 cm |
| **Breidd** | 188,6 cm |
| **Hædd** | 150,0 cm |
| **Vekt** | 1.500 kg |
| **Viðførisrúm** | 540 litrar |
| **Prísur** | Kr. 272.000 |
| **Søluumboð** | P/f Wenzel<br>Akranesgøta 5<br>FO-100 Tórshavn<br>Tel. 354500<br>www.wenzel.fo |